GJALDSTOVAN

Fíggjarmálaráðið

Argir, tann 8. oktober 2025

Viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin).

Gjaldstovan hevur fingið lógaruppskotið at ummæla. Sum vit skilja tað, eru flestu broytingar fylgibroytingar, nágreiningar og broytingar fyri at lætta um trupla umsiting. Tað hava vit ikki viðmerkingar til, annað enn at tað altíð er gagnligt at gera umsitingina greiðari og einfaldari.

Vit hava gjørt av bara at viðmerkja broytingina í § 9, stk. 1:

> **§ 9.** [3)] Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Í samansparingartíðarskeiðnum er alt virðið, ið er knýtt at eftirlønarsamansparingini, at meta sum kapitaleftirløn við arvarætti, um eftirlønarsamansparari ikki hevur gjørt aðra avtalu.

Í viðmerkingunum til broytingina stendur hetta:

> **Til § 1, nr. 12**
> Ásett verður við hesi broytingini til § 9, stk. 1., at útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar náa fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, tó við undantøkunum í stk. 5 og 9. Seinni partur av § 9, stk. 1 verður ikki broyttur sbrt. uppskotinum.

Tað ber til at útseta fólkapensjónina. Higartil hevur hetta borið við sær, at tað ber til útseta útgjaldið úr eftirlønargrunninum, til samanspararin fær útgoldið fólkapensjón. Tað ber til at útseta fólkapensjónina fleiri ferðir, og tað er ikki einfalt at fáa boðini millum skipanirnar, so hetta hevur gjørt umsitingina trupla, sum eisini verður sagt í lógaruppskotinum.

Gjaldstovan hevur fleiri ferðir mælt til, at sambandið millum fólkapensjón og eftirlønarútgjald verður kvett. At tað verður ein spurningur millum samanspararan og eftirlønarfelagið, nær eftirlønarútgjaldið byrjar. Fólkapensjóninsaldurin hevur hjá fleiri einki samband við, nær tey fara úr starvinum.

Lat okkum sum dømi taka eina, sum fer frá, tá ið hon er 72 ár – sum er fráfaringaraldurin hjá tí almenna.

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

- Í 4,5 ár sleppur hon ikki at spara upp til eftirløn, men skal í staðin hava eftirlønargjaldið útgoldið sum løn
- Hon sleppur ikki at útseta eftirlønarútgjaldið, men skal í staðin fáa tað útgoldið, frá tí degi hon er 67,5 ár.

Hon fær væl større inntøku árini millum 67,5 ár og 72 ár. Eftir flestu almennu sáttmálum fær hon í minsta lagi 15% meiri í løn. Afturat tí fær hon samhaldsfasta, møguliga fólkapensjón (um hon ikki hevur útsett hana) og útgjald frá eftirlønargrunninum – afturat síni føstu løn.

Samsvarandi fær hon lægri eftirlønarútgjald, tá ið hon er vorðin 72 ár:

- Einki er goldið inn í 4,5 ár
- Tað, hon hevur spart upp, skal røkka í 4,5 longur enn tað hevði skulað, um hon slapp at útseta eftirlønarútgjaldið.

Havast skal eisini í huga, at fleiri av teimum, sum í dag eru um henda aldurin, hava ikki goldið spart upp til eftirløn alt sítt arbeiðslív og hava heldur ikki so nógv upp, øll árini, tey hava spart upp. Eftirlønarprosentið hevur ikki verið so høgt øll árini.

Sjálvandi kann hon spara upp sjálv, bæði tað útgoldna eftirlønargjaldið frá arbeiðsgevaranum og útgjaldið frá eftirlønarfelagnum. Men vónandi megnar eftirlønarfelagið at umsita peningin so mikið væl, at tey fáa meiri burtur úr, enn tað sum fæst fyri eina vanliga uppsparing.

Nakað annað er, at flytur hon seinni á ellisheim, so er gjaldið fyri búpláss ávirkað av inntøkuni og inntøkan verður jú lægri, enn hon annars hevði verið. Hetta má ávirka inntøkurnar hjá eldraøkjunum.

Tí hava vit ógvuliga ilt við at skilja hesa viðmerkingina í lógaruppskotinum:

> Fíggjarmálaráðið metir, at skal eftirlønarsamansparingin vera til gagns fyri samanspararan og fyri samfelagið, er neyðugt, at samansparingin tryggjar, at fólk í størri mun fíggjarliga kunnu forsyrgja sær sjálvum, so hvørt sum tey gerast pensjónistar og, sum frálíður, gevast at arbeiða.

Er henda viðmerkingin ikki í andsøgn við lógarbroytingina, sum verður skotin upp?

Vinaliga

Durita Tausen, varastjóri

GJALDSTOVAN

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO